


*Nú sæst rættiliga, hvussu nýggi smyril fer at síggja út. Yvirbygningurin er settur á hann og sostatt er hann liðugur uttan. Nú skal hann innrættast og at enda skal hann málast. Beint undir brúnni eru kømur og onnur rúm til manningina. Beint undir manningarrúmunum er matstova til ferðafólk við teimum stóru vindeygunum. Og beint undir matstovuni, eru eisini salongir, forhøll og annað*

# Soleiðis sær nýggi Smyril út

**Nú er yvirbygningurin settur á nýggja Smyril og sostatt sæst nú rættiliga, hvussu hann fer at síggja út**

NÝGGI SMYRIL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú sæst rættiliga, hvussu nýggi Smyril fer at síggja út.

fyri einum mánaða síðani varð nýggja flaggskipið hjá strandferðsluni flotað og síðani varð hann sleipaður yvir á eina aðra skipasmiðju beint við.

Har er yvirbygningurin nú settur á hann so nú sæst veruliga, hvussu hann fer at síggja út.

Magnus Magnussen, tekniskur stjóri hjá Strandferðsluni, sum er í Spania og hevur eftirlit við arbeiðnum, sigur at byggingin gongur framvegis sum ætlað.

Nú skal skipið innrættast og allar innleggingar gerast.

Seint í summar er ætlanin at royna allar skipanirnar umborð og í september skal hann royndartúr at vita, hvussu alt riggar.

Tað er ásett, at nýggi Smyril skal handast Strandferðsluni 12. oktober og tekniski stjórin á Strandferðsluni sigur, at hann dugir ikki at síggja nakað til hindurs fyri, at tíðarætlanin fer at halda.

Annars lata vit myndirnar tala fyri seg.



*Her sæst inn á hekkuna á nýggja Smyrli. Hann hevur tvey hekkuportur. Her er annað portrið opið*



*Her sæst inn á sjálvt forskipið*



# Listaskúli óvissa framtíð

**Klaksvíkar Listaskúli, sum er undir kvøldskúlanum, hevur húsast í einum sethúsum farna skeiði, og tey hava fingið at vita, at tey fáa somu hús aftur komandi skeið. Men tað kann vera skjótt, at húsið verður nýtt til annað virksemi, og so verður skúlin húsvillur**

LIST
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Listaskúlin í Klaksvík hevur júst havt framsýning, og skeiðið er nú komið at enda í ár. Skúlin er tó í einari lítlari knípu, tí hann hevur ongi føst høli at halda til í*

**Klaksvík:** Eitt skeið á Listaskúlanum er júst farið afturum, og ein framsýning var sum vanligt endabresturin. Áhugin fyri at mála millum norðoyingar er rættuliga stórur. Archibald Black, sum er lærari, hevur havt 34 næmingar í júst farna skeiðið. Og hann sigur, at tað standa onnur 30 á bíðilista.

Og harvið er áhugin staðfestur má sigast. Men Listaskúlin hevur ein stóran trupulleika, tí tey ikki hava nakað fast høli at húsast í.

Skúlin helt til á ovast hædd í býráðshúsinum, men har skuldu skrivstovur gerast, so tey vórðu koyrd út. Archi sigur, at tey fingu lovað ovaru hæddina á Isenkram, men har heldur net-kaféin til, so skúlin var húsvillur í eina tíð.

– Men so kom Heri Ellingsgaard, stjóri á sjúkrahúsinum, sum ein frelsandi eingil og bjóðaði okkum húsið hjá Waagstein, so har eru vit nú, og har eru umstøðurnar sera góðar, sigur Archi, sum ikki heldur nógv um viðferðina, sum skúlin fekk frá kommununi.

Men samstundis er tað nakað ótrygt hjá teimum, tí sjúkrahúsið kann ikki lova teimum hølini langt fram í tíðina. Tað kann verða so skjótt, at sjúkrahúsið fær brúk fyri húsunum til eitthvørt annað, og so stendur Listaskúlin aftur uttan høli. Tað er heldur ikki bara sum at siga tað at finna onnur skikkað høli í Klaksvík, tí hølistrupulleikar er ein afturvendandi trupulleiki hjá fleiri feløgum í býnum.

Archi er sera harmur um hetta, tí hann heldur, at hetta tilboðið átti ikki at verðið sæð lættliga á.

– Meginparturin av mínum næmingum eru tilkomin fólk, og eg trúgvi, at tilkomin fólk hava brúk fyri hesum tilboðnum, sigur hann.

## Nógv burturúr

Skeiðið á kvøldskúlanum er vanliga 90 tímar. Tað byrjar í oktober og endar í apríl. Men í ár var skeiðið bert 80 tímar orsakað av hølistrupulleikunum.

Men hetta kann ikki sigast at hava nervað næmingarnar nakað serligt, tí um hugt verður eftir øllum, sum tey hava fingið burturúr, so er tað ikki so lítið.

Flestu næmingarnir luttóku á framsýningini Fram í Ljósið, sum Norðoya Sparikassi stóð fyri í mars mánaði, og tað serstaka var, at næstan onki listaverk gekk aftur í framsýningini í Ósáskúlanum sunnudagin.

Archi sigur, at næmingarnir eru serstakliga produktivir. Og hann vísir aftur á tann stóra áhugan sum er fyri málningalistini í norðoyggjum. Hann hevur sjálvur trý lið, sum mála ávíkavist mánadag seinnapart, mánakvøld og mikukvøld. Men við 30 fólkum á bíðilista, so er onki at taka seg aftur í, at hann væl kundi tikið minst eitt lið inn afturat. Men tað, sigur hann, ber ikki til.

– Um eg skal gera tað, so verði eg ov lítið við hús. Men loysnin hevði uttan iva verið, at onkur annar lærari eisini traðkaði til, heldur Archi.

Og hann leggur afturat, at hann hevur skilt, at Maria Mørkøre er byrjað at undirvísa í málningalist í Handarbeiðsskúlanum. Og tað fegnast hann um.

Listaskúlin er sum sagt farin í frítíð nú, men byrjað verður aftur í oktober í húsunum hjá Waagstein. Men spurningurin er so, hvussu longi Listaskúlin sleppur at húsast har.

# Nýggj kafé latin upp í Klaksvík

**Kafé KÍ varð alment tikin í nýtslu fyrstu ferð sunnudagin. Eini snotilig høli, har viðhaldsfólk hjá bæði heimaliði og gestaliði kunnu njóta ein heitan munn í hálvleikinum ella vera inni og hyggja at dystinum**

KAFÉ
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Snotuliga og nýggja kaffistovan í KÍ høllini, Kafé KÍ, lat upp sunnudagin, og væl av fólki vitjaðu*

**Klaksvík:** Gamla Lognbrá, ungdómsdiskotekið í Klaksvík, er ikki at kenna aftur. Eftir at hava fingið eina kerliga hond frá fleiri sjálvbodnum, er hølið nú broytt til eina hugnaliga kafé, har okkurt er til bæði vaksin og børn.

Fyrst og fremst er sjálvandi møguleiki at keypa sær okkurt at eta og drekka. Nógv sitipláss eru inni, og í hvørjum horni hanga sjónvarp upp undir loftinum, har fótbóltur uttan iva fer at verða at síggja hvørt kvøld. Nøkur spøl eru eisini til børnini at stuttleika sær við.

Hølið má sigast at vera sera snotiligt og rúmligt er eisini inni. Á veggunum hanga nógvar myndir. Gamlar sum nýggjar. Og tað er stuttligt at kunna hyggja at søguni hjá felagnum í myndum.

Kristianna Danielsen, sum hevur ábyrgdina av kaféini sigur, at hon helst fer at lata upp, tá liðini byrja at venja um dagarnar og vera opin út á kvøldið alt eftir hvør tørvurin vísir seg at vera.

Hendan sunnudagin tá kaféin letur upp á fyrsta sinni er alt tó ikki komið upp á pláss. Kristianna sigur, at ætlanin er at selja pizza og annað, sum kann heitast í mikroovnum, men tað verður helst ikki fyrr enn seinni í vikuni, at tað verður møguligt.

## Betri umstøður

KÍ kaféin er uttan iva ein munandi bati á umstøðunum kring vøllin og serliga hesa ársins tíð. Tí mangan er kalt og ilsligt at standa á Djúpumýru og hyggja at fótbólti, og mangur man hava saknað eitt stað at kroka í í hálvleikinum. Men tað er nú alt farið í søguna, og nú fegnast øll um hesa nýggju kaféina, sum júst er vorðin veruleiki.

Kristianna sigur, at tað longi hevur verið tosað um, at viðurskiftini rundan um vøllin ikki hava verið nóg góð. Serliga tá hugsað verður um fólk, sum koma aðrastaðnis frá til dystir í Klaksvík.

– Nú hava vit so okkurt at bjóða teimum, meðan tey eru her. KÍ er jú annað enn 1. deild. Her koma nógv foreldur hvørt vikuskifti við ungum leikarum, sum skulu leika, og tað hevur verið sera harmiligt ikki at kunna bjóða teimum eitt stað at vera í, sigur hon.

Kafé KÍ varð sum sagt tikin í nýtslu sunnudagin, og nú verður hon opin hvønn dag framyvir. Heilt nógv fólk vitjaðu hendan dagin. Summi komu bert inn í hálvleikinum til eina heitan munn, meðan onnur nýttu høvi til at seta seg niður inni har og síggja dystin úti á vøllinum. Karmarnir eru góðir inni í nýggju kaféini, og við teimum mongu, sum dagliga hava sína gongd í KÍ høllini ella koma at síggja dystirnar, fer kaféin uttan iva at verða væl vitjað framyvir.

# Mugu seta okkum mál

**Jógvan við Keldu, landsstýrismaður, helt Flaggdagsrøðuna í Klaksvík sunnudagin. Nógv fólk varð savnað í Vágstúni í góðveðrinum**

FLAGGDAGUR
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Klaksvík:** Skrúðgonga við Klaksvíkar Hornorkestri og skótum á odda fór úr Klaksvíksgarðinum klokkan trý og heim í Vágstún, har Jógvan við Keldu helt røðu. Eisini sungu 17 sangarar tveir sangir.

Jógvan við Keldu nam eitt sindur við søguna hjá Merkinum og legði dent á, hvussu stóran týdning tíggjuára skeiðið 1938 – 1948 var fyri Føroyar og Merkið.

Síðani setti hann spurningin, hvussu týdningarmikið komandi tíggju ára skeið 2004 – 2014 fer at verða.

Jógvan segði, at føroyingar mugu seta sær mál til tess at fáa Merkið og landið meira sjónligt í heimssamfelagnum.

– Síðani kunnu vit spyrja okkum sjálvi: »Røkkur okkara merki nóg langt út í heim«. – Nei her mugu vit ásanna, at tað restar í, og hvør hevur ikki upplivað, sum hevur umboðað land okkara, at Merkið okkara - føroyska flaggið – ikki sást millum hini. Oftast hevur verið átalað við góðum úrsliti, meðan tíverri onkuntíð bara tagdu vit, segði Jógvan við Keldu millum annað.

Hann vísti somuleiðis á, at føroyingar mugu ikki stara seg blindar á flaggið, men seta spurningin, hvat er aftanfyri og hvørja ávirkan hava vit, har føroyska flaggið veitrar og fer at veitra í framtíðini.

– Latið okkum á hesum flaggdegi 25. apríl 2004 seta okkum nøkur mál bæði tjóðskaparliga og á altjóða støði soleiðis, at tá Merkið okkara veitrar, eru verulig virði aftanfyri, segði landsstýrismaðurin at enda í røðu sínari.



*Nógv fólk var til Flaggdagshald í Klaksvík sunnudagin. Uttan iva mundi góða veðrið vera ein orsøk til tað*